## Føroyskur tónleikur í AaB

Danska fótbóltsfelagið AaB hevur ein tónleikabólk á liðnum hjá sær, og tveir av tónleikarunum eru føroyingar. Bæði Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen duga at spæla ljóðføri, og teir manna AaB Band saman við nøkrum liðfeløgum. Um vikuskiftið spældi AaB Band í sambandi við avslutningin hjá AaB á venjingarleguni á Kypros. Heimasíðan hjá AaB skrivar, at tað var bæði brasilskt samba og føroyskur solosangur á skránni. Føroyska sanginum stóð Súni Olsen fyri.

## Inter hevur beina kós

Italska felagið Inter vann sín 17. sigur á rað í bestu italsku fótbóltsdeildini, tá ið liðið spældi ímóti Catania um vikuskiftið. Dysturin endaði við 5-2 sigri til Inter. Hvørja ferð Inter vinnur, er tað nýtt met, og felagið er eisini langt fremst í italsku Seriu A. Hóast sigursgongdina er tað ikki vist, at venjarin Robert Mancini vil leingja sáttmálan við felagið, og sambært italskum miðlum skal avloysarin so verða svenski Sven-Gøran Eriksson.

# Dramatiskur Chelsea-sigur

**Didir Drogba var maðurin, sum við tveimum málum søkti Arsenal. Men Carling Cup finalan verður eins nógv mint fyri tríggjar útvísingar og ein ógvusligan tilburð, sum sendi John Terry á sjúkrahús**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast Arsenal legði best fyri, var tað Chelsea, ið vann Carling Cup steypafinaluna, men sigurin var dýrt vunnin. Liðskiparin John Terry varð borin av vøllinum uttan vit.

Arsenal legði seg á odda við máli frá Theo Walcott tíðliga í dystinum, men Chelsea og Drogba vildu tó ikki gevast. Ivorianarin fekk skjótt javnvág í roknskapin, og við seks minuttum eftir av vanligu leiktíðini var hann eisini maðurin, sum avgjørdi dystin.

### Dramatikkur og óhugni

Tað eru tó tvær hendingar, sum verða hangandi í minninum, tá tosað verður um dystin.

Fyrra av hesum var, tá Chelsea-liðskiparin, John Terry, tíðliga í sienna hálvleiki kom heilt illa fyri. Eftir hornaspark tveitti Terry seg fram í royndini at stúta bóltin, men samstundis royndi Diabi at flukta bóltin burtur. Úrslitið gjørdist eitt ógvusligt spark í høvdið á Terry, sum púrasta lívleysur small niður. Við iltmasku og kraga varð hann fluttur í sjúkrabil, og mong mundu draga andan lættari, tá tað seinni um kvøldið hoyrdir, at hann – tveir tímar seinkaður – kortini fann vegin fram til Chelsea-veitsluna.

Og so gjørdist endin av dystinum annars rokmikil. Steðgurin eftir Terry-tilburðin var langur, og tí vórðu ikki færri enn 12 minuttir lagdir afturat vanligu leiktíðini. Í hesi fingu ikki færri enn tríggir spælarar reytt kort, eftir at Kolo Touré og Jon Obi Michel komu til ilnar. Endin varð, at teir báðir saman við Adebayor hjá Arsenal vórðu riknir av vølli, og tað kundi eingin teirra mótmæla nakað serligt.



*Rættiligt rok kom í grindina seinastu løtuna. Endin varð, at tríggir spælarar vórðu riknir av vøllinum, men Chelsea stóð enn eftir við steypinum*

*Mynd: Scanpix*

SUNDA KOMMUNA

## Tveir pedagogar søkjast

sansir.fo

**Søkt verður eftir**
- einum pedagogi til Barnagarðin við Kráir í Hvalvík – vøggustovan - 30 t/v. ella eftir nærri avtalu
- einum pedagogi til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík, 30 t/v

at byrja 1.mars 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Vit ynskja, at tú hevur**
- hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- hug til at skapa og seta dám á dagstovnin
- góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
- eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- ein stovn í er í støðugari menning
- eitt arbeiðspláss, har tú kemur at hava ávirkan

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til**
- Barnagarðin við Kráir: Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 772021 ella 422717
- Dagstovnin við Stórheygg: Honnu Thøgersen, leiðara, á tlf. 772020 ella 472020

**Umsóknir við avritum av prógvi v.m. skulu sendast til**

Sunda kommunu
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki

ella við telduposti til: sunda@sunda.fo

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 28. februar 2007

Í Sunda kommunu eru tríggir dagstovnar: á Oyrarbakka, í Hvalvík og í Hósvík. Barnagarðurin við Kráir hevur pláss fyri 60 børnum, og har starvast í løtuni 13 fólk. Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík hevur pláss fyri 58 børnum, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Leiðararnir á teimum trimum sagstovnunum hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.

**SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 7 | - | 0 | - | 0 | 383 | 295 | 88 | 20 |
| 2 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 395 | 336 | 59 | 17 |
| 3 VB | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 395 | 395 | 0 | 11 |
| 4 StÍF | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 326 | 408 | -82 | 6 |
| 5 Kyndil | 7 | 0 | - | 1 | - | 6 | 340 | 405 | -65 | 3 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN**

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 518 | 475 | 43 | 16 |
| 2 Kyndil | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 500 | 470 | 30 | 15 |
| 3 StÍF | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 458 | 453 | 5 | 13 |
| 4 KÍF | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 451 | 467 | -16 | 13 |
| 5 Neistin | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 509 | 496 | 13 | 11 |
| 6 H71 | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 459 | 534 | -75 | 6 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 17 | 12 | - | 5 | 42 | 30 | 12 | 17 |
| 2 SÍ | 17 | 11 | - | 6 | 39 | 28 | 11 | 16 |
| 3 Dráttur | 18 | 11 | - | 7 | 42 | 34 | 8 | 115 |
| 4 KÍF | 18 | 7 | - | 11 | 35 | 38 | -3 | 12 |
| 5 TB | 17 | 8 | - | 9 | 32 | 29 | 3 | 10 |
| 6 Mjølnir | 17 | 3 | - | 14 | 15 | 46 | -31 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 14 | 12 | - | 2 | 38 | 16 | 22 | 17 |
| 2 Mjølnir | 14 | 10 | - | 4 | 33 | 21 | 12 | 14 |
| 3 Fram | 15 | 8 | - | 7 | 30 | 30 | 0 | 12 |
| 4 Fleyr | 115 | 4 | - | 111 | 21 | 37 | -16 | 6 |
| 5 SÍ | 14 | 2 | - | 12 | 21 | 39 | -18 | 3 |